# Juli var sólríkari enn vanligt

VEÐURFRØÐI

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Onki er so troyttandi, sum at sita og tosa um farið veður eftir minninum. Tað hevur antin hug at gerast betri enn tað var ella verri enn tað var. Sjálvdan sum tað var. Summrini vóru nógv betri fyrr, tá líktust Føroyar tropulondunum frá seinast í apríl og langt út í september. Gloymt er alt um fellisárini, tá smálomb undan sleptum óm frystu í hel í mai og kappróðrarbátar lensaðu inn um Klakk á Norðoyarstevnu við landnyrðingsheglingi pískandi eftir bakinum og ung máttu fríggja fyri at halda hitanum fyrst og fremst.

Lat okkum fáa veðurtíðindi svart upp á hvítt, tøl í tala, so eru veruleikin ofta ein heilt annar. Lat okkum gera teimum, sum um 50 ár fara at fortelja abbabørnunum um alla sólina í mai í ár til skammar við turrum tølum.

Mai var ikki sólríkur í ár, slett ikki. Hann var næstan uttan sól, skulu vit meta saman við bara eitt heilt vanligt meðal ár. Tað vóru 65 sóltímar taldir í Havnini í mai. Eitt vanligt miðalár, talt yvir seinastu 30 árini, eru 124 sóltímar í mai í Havn.

Og juni var heldur einki serligur, í hvussu er undir miðal. Taldir vóru 114 sóltímar móti 125 í meðal seinastu 30 árini.

Men juli, tá fittur partur av føroyingum leitaðu sær uttanlands eftir sól, hann lumpaði okkum so dyggiliga. Tí sólin skein nevniliga í juli, og hon skein munandi meira enn í juli onnur ár seinastu 30 árini. Taldir vóru 127 sóltímar móti 111 eitt vanligt ár.

Mínir harrar! Var summarið gott í ár? Vit hava ikki tølini fyri august enn, men taka vit mai, juni og juli so var summarið undir miðal. Taldir vóri 306 sóltímar hesar mánaðar, móti 360 sóltímum í meðal undanfarnu 30 árini.



*Í juli var sól og summar kring alt landið*
*Mynd Álvur Haraldsen*

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Fyrrapartin lot av ymsum ættum, men seinnapartin veksur hann vindin upp í hvassan vind av landnyrðingi. Ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Fyrrapartin hvassur vindur ella skrið av landnyrðingi og ælingur, men seinnapartin minkar hann vindin niður í stívt andøvsgul og yvirhøvur turt. Hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi, seinnapartin lot av ymsum ættum. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 8 og 11 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi og suðri og okkurt ælið, men eisini sólglottar. Hitin millum 8 og 12 stig.

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | 6 |
| Nuuk | 4 |
| Qaqortoq | 8 |
| Ammassalik | 7 |
| Saint John's | 18 |
| Halifax | 20 |
| Reykjavík | 7 |
| Seyðisfjørður | 8 |
| Tórshavn | 10 |
| Lerwick | 14 |
| Aberdeen | 15 |
| London | 21 |
| Tromsø | 11 |
| Bergen | 19 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 24 |
| Keypmannah. | 23 |
| Helsinki | 20 |
| Moskva | 21 |
| Berlin | 25 |
| Warzawa | 26 |
| Kiev | 19 |
| Bukarest | 25 |
| Paris | 20 |
| Madrid | 24 |
| Róm | 25 |
| Malorca | 28 |
| Athen | 26 |
| Malta | 26 |
| Tunis | 24 |
| Beijing | 27 |
| New Dehli | 30 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 25 |
| New York | 28 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 23 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | – |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 20 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 986 hPa vestan fyri Føroyar fer spakuliga móti Skotlandi.




Lágtrýstið við Skotland fer spakuliga í landsynning og ein hátrýstryggur vestan fyri Ísland fer eystureftir og verður væntandi yvir Føroyum sunnudagin.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 04/09 kl. 06[00]– 05/09 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 9,9°
Minsti hiti máldur í sept.: ÷0,5° Mesti hiti máldur í sept.: 19,5°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 3,0 mm – mált frá 04/09 kl. 06[00]– 05/09 kl. 06[00]
Avfallið higartil í september: 26,1 mm




**Vika 36 – 4. september**
Vinnaratøl: **08 - 24 - 28 - 30 - 31 - 48**

Eykatøl: **10 - 23**

| | |
|---|---|
| 6 vinnaratøl: | 1.798.492,- kr. |
| 5 vinnarat.+ eykatal | 193.158,- kr. |
| 5 vinnaratøl: | 3.941,- kr. |
| 4 vinnaratøl: | 139,- kr. |
| 3 vinnaratøl: | 42,- kr. |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

## VESTFALLSKYRRINDI

26. august: Mánin longst frá jørðini
31. august: Seinna kvarter
7. september: Tendring
8. september: Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2002

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 6. sept | 06.41 | 19.07 | 05.41 | 18.07 | 05.56 | 18.22 | 08.41 | 21.07 | 09.41 | 22.07 | 04.56 | 17.22 | 03.56 | 16.22 | 06.56 | 19.22 | 07.56 | 20.22 | 06.26 | 18.52 | 07.41 | 20.07 |
| 7. sept | 07.31 | 19.56 | 06.31 | 18.56 | 06.46 | 19.11 | 09.31 | 21.56 | 10.31 | 22.56 | 05.46 | 18.11 | 04.46 | 17.11 | 07.46 | 20.11 | 08.46 | 21.11 | 07.16 | 19.41 | 08.31 | 20.56 |
| 8. sept | 08.19 | 20.43 | 07.19 | 19.43 | 07.34 | 19.58 | 10.19 | 22.43 | 11.19 | 23.43 | 06.34 | 18.58 | 05.34 | 17.58 | 08.34 | 20.58 | 09.34 | 21.58 | 08.04 | 20.28 | 09.19 | 21.43 |
| 9. sept | 09.09 | 21.36 | 08.09 | 20.36 | 08.24 | 20.51 | 11.09 | 23.36 | — | 12.09 | 07.24 | 19.51 | 06.24 | 18.51 | 09.24 | 21.51 | 10.24 | 22.51 | 08.54 | 21.21 | 10.09 | 22.36 |

5 707265 100050 >